Almannaverkið tørvar tveir nýggjar bussar til 8-9 fólk (til 1-2 koyristólsbrúkarar)

Treytirnar eru fylgjandi

- Bilurin skal nýtast í samband við borgarar sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum skulu koyrast.
- Bilurin skal hava 9 setur tilsamans. Bilurin skal hava møguleika fyri at blíva umbygdur á verkstað, til bert hava enkult setur aftan, í mun til koyristóla innrætting.
- Bilurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin verða egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar.
- Hæddin skal verða H2, og longdin í lastarúminum skal verða so long at rúm er fyri 1-2 koyristólum – ofta er tað L2.
- Levering skal verða í ár, seinast januar 2023. Veitarar sum ikki klára leveringsásetingina, eru tó vælkomnir at lata inn tilboð – í fall ongin klárar innan ásettu tíð
- Veitarin kann bjóða buss sum er umbygdur til koyristól, so skal hetta verða upplýst. Vit ynskja at skinnara system, sum koyristólar verða festir í, er lætt hjá starvsfólkum at handfara. Dømi um slíkt: https://www.youtube.com/watch?v=meOKHWYBy6o
- Um veitarin ikki umbyggir bussin, so er best er um bussurin er í Danmark, og kann leverast til okkara veitara at byggjast um til koyristól.
- Litur: Bilurin skal helst verða hvítur ella koksgráður/myrkagráur
- MVG og skrásetingar upphædd skal upplýsast

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Upplýsast skal, at tað kann henda at Almannaverkið hevur tørv á fleiri bilum tá ið vit taka av tilboð, og tá tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar, uttan at tað verður boðið út av nýggjum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Alamannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

- Prísur 60 %

- Egnaður til endamál 20 %
- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til hallurt@av.fo.  Spurninganir verða síðani viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi mánadagin 22. sep 2022 kl 1600. Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna av spurning. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. sep 2022 kl 1000

Tilboðið skal sendast við telduposti til hallurt@av.fo